SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

# ÍTRÓTTUR

# Suðuroyarliðið á toppinum

**Samanleggingin millum dreingjaliðini í Suðuroy endaði við einum framúr góðum úrsliti. Liðið vann gull í landskappingini eftir harða kapping við NSÍ alt árið**

DREINGIR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er nakað, sum bendir á, at tað kann loysa seg við fótbóltsligum samanleggingum í Suðuroynni. Meðan fleiri av teimum vaksnu liðunum í Suðuroy hava havt eitt trupult kappingarár í bestu og næstbestu deildini, hevur samanlagda dreingjaliðið verið flúgvandi.

VB/TB hevur kappast við NSÍ um gullið í landskappingini, og tað gjørdist at enda liðið úr Suðuroy, sum hevði munin á stigatalvuni.

Avgerandi dysturin var í grundini spældur í Runavík í triðseinasta umfari, og tá vann VB/TB 4-1 á NSÍ. Í næstseinasta umfari fall teoretiska avgerðin eisini, og tí kundu teir úr Suðuroy fara lættir í sinni norður til Skála at spæla seinasta dystin. Eftir dystin handaði Rúni Heinesen vegna FSF liðnum gullmerkini og steypið.

### Samstarvið riggar væl

Tað er ikki heilt ókent fyri lið úr Suðuroy at vinna dreingjadeildina, tí bæði í 2001 og 2002 var VB føroyameistari hjá dreingjum. Hinvegin var TB seinasta føroyameistari hjá dreingjum í 1971!

Hesaferð hava dreingir frá VB og TB manna suðuroyarliðið, sum hevur staðið seg so væl. Stóri parturin av spælarunum eru úr TB, men nakrir heilt góðir spælarar úr Vági hava styrkt liðið sera nógv.

- Tað hevur riggað sera væl at leggja liðini saman. Spælararnir hava trivist væl saman, og teir hava verið sera raskir til venjing, sigur Milan Cimburovic, sum er annar venjarin hjá liðnum. Hin venjarin er Jón Pauli Olsen úr Vági.

VB/TB hevur spælt í búna hjá VB í summum dystum og í búna hjá TB í summum dystum. Heimdystirnir hava verið spældir lutvíst í Vági og lutvíst á Tvøroyri.

VB/TB hevur spælt 10 dystir í endaspælinum hjá dreingjum, og bert einaferð tapti liðið. Tað var á útivølli ímóti KÍ. Heimadysturin ímóti NSÍ endaði við javnleiki, men annars vann liðið allar hinar átta dystirnar. Og tað var nóg mikið til at tryggja sær FM-heitið í dreingjadeildini.

**Dreingir – meistarabólkur**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1. VB/TB | 10 | 8-1-1 | 49-12 | 28 |
| 2. NSÍ | 10 | 7-1-2 | 47-17 | 24 |
| 3. B36 | 10 | 6-1-3 | 37-17 | 20 |
| 4. KÍ | 10 | 3-1-6 | 30-28 | 11 |
| 5. Skála | 10 | 2-2-6 | 10-31 | 9 |
| 6. EB/Str. | 10 | 1-0-9 | 9-77 | 4 |




*VB/TB føroyameistari hjá dreingjum 2006. Aftan frá vinstru: Milan Cimburovic, venjari, Jón Pauli Olsen, venjari, Michael Jespersen, Pætur Mohr Mortensen, Heini Bech, Sjúrður Ferjá, Heini Vatnsdal, Teitur Tausen, Andreas Vestergaard, Heini Mortensen, Martin Tausen.*
*Framman frá vinstru: Benjamin Petersen, Chris Craib, Jón Magnusarson, Gunleif Olsen, Rani Johanesen, William Berg, Jan Smedemark, Adrian Cieslewicz, Hanus Mortensen, Tórur Sørensen*



*NSÍ vann silvur hjá dreingjum. Aftast frá vinstru: Viljormur Davidsen, Andre Olsen, Klæmint Olsen, Karl Løkin, Bárður Jóhannussen, Eyðstein Joensen, Monrad Jacobsen, Arnold Davidsen og Áki L. Hansen, venjari*
*Fremst frá vinstru: Roki Jovanovic, Per Langgaard, Petur Meinhard Magnussen, Búi í Hjøllum, Heri Nesá, Remi Langgaard*

*Mynd: Mildrið Hentze*



*B36 vann bronsu hjá dreingjum. Aftan frá vinstru: Bjarni Arnason, venjari, Jan Hjaltalin Olsen, Fríði Gullbein, Sjúrður Thomassen, Julian Jónsson Johansen, Fríði í Geil Jensen, Christian í Garði, Hanus Dahl Johannessen, Allan Dybczak, venjari og Brian Vang*
*Framman frá vinstru: Høgni Eysturoy, Janus Mortensen, Uni Holm Johannesen, Brandur Mortensen Nolsøe, Ámund Nolsøe, Suni Johannesen, Róaldur Jacobsen, Jóannes Martin Johannesen, Alex Mellemgaard*

*Mynd: Guttorm Sørensen*